Starv

# Skrivstovufólk

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir skrivstovufólki (M/K) til fólkaflutningsdeildina - Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá tí, ið sett/ur verður**
Uppgávur hjá skrivstovufólkinum verða m.a. at taka sær av:
- Avrokningum til privatu arbeiðstakararnar
- Elektronisku skúlakortunum
- At avlesa modulir til Buscom-skipanina
- Skaðafrágreiðinum v.m.
- Fyrifallandi uppgávum á skrivstovuni
- Vanligari kundavgreiðslu

**Førleikakrøv**
- Góðan tænastuhugburð
- Góðan edv-kunnleika
- Málrættaður
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevni
- Fyrimunur er um tann, ið settur verður hevur royndir og kunnleika innan bókhaldsskipanina Navision
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 22. mars 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Guðrið Ellefsen, á tlf. 34 30 00 ella e-postur: gue@ssl.fo.

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum/Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Sernámsdepilin

# Sálarfrøðingur

Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum avloysari fyri sálarførðing í barnsburðarfarloyvi leyst at søkja. Tíðarskeiðið er frá 1. mai 2002 og árið at enda.

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálastýrinum, sum umframt at umsita og at menna sernámsfrøðiliga virksemið í undirvísingarverkinum, skipar fyri og ráðgevur í sambandi við allar sernámsfrøðiligar spurningar og veitir tænastur til børn og ung í aldrinum 0-18 ár.

Í Sernámsdeplinum fer fram fjøltáttað sernámsfrøðiligt– og sálarfrøðiligt virksemi. Her er serskúli fyri børn og ung í aldrinum 7-18 ár, eygleiðingarbarnagarður fyri børn undir skúlaaldur, taliinstitutt og annað sernámsfrøðiligt virksemi. Sálarfrøðingar í Sernámsdeplinum skipa saman við Landssjúkrahúsinum fyri barnapsykiatriskari konsulenttænastu. Á stovninum arbeiða eini 50 fólk.

Sálarfrøðingarnir taka sær fyrst og fremst av ráðgeving/vegleiðing av foreldrum, lærarum, pedagogum og øðrum fakfólkum og av kanning/viðgerð av børnum og ungum.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**
- Cand. psyk/ cand. ped. psyk.- ella samsvarandi.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt –psykologiskum og pedagogiskt –psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar- og viðgerðaruppskotum.
- Hava hug og evni at ráðgeva/vegleiða øðrum fakbólkum.
- Tala føroyskt.
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er ein fyrimunur.

PS. Møguleiki er fyri supervisión. Sálarfrøðingi við autorisasjón verður veitt serlig viðbót.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til: **Sernámsdepilin, Frælsið 32, Postrúm 2036, FO-165 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 5. apríl 2002.**

Nærri um starvið fæst við at venda sær til Hans Eli Dahl, Sernámsdepilin, tlf. 314522.

Sosialurin -har Sosialurin tað hendir

# Handilshølir

**við høvuðsvegin í Saltangará til leigu.**




**Tlf. 447421**

# Bátur við fiskiloyvi til sølu

*Væl útgjørdur seksaringur, 31 fót, til sølu um hóskandi boð fæst.*



Báturin er væl hildin, hevur 70hk sole diesel so gott sum nýggjan motor, VHF, radara 36 fj., sjálvstýrara, telefon, radio, plottara, ekkolod, kabys og gasplus, línuspæl og línurennu, 4 svenskar el. snellur, gummibát 4 pers. og mangt annað.

Um hetta hevur tín áhuga, so ring vinarligast og hoyr nærri.

**Tlf. 212504**

Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið



Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
Sosialurin - 311820



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur« »Fundir«og »Matur«Bill. merktar

## Akfør

**NISSAN**
Nissan Pick-up, árg. 87, til sølu.
*Tlf. 223011*

**MITSUBISHI LANCER**
1.6 árg. 87. Við sportsfelgum og dekkum. Til sølu fyri 10.000 kr.
*Tlf. 457504 ella 228220*

**TOYOTA COROLLA**
st. car árg. 83, til sølu. Hevur plátur.
*Tlf. 211514*

**BMW 525**
turbo diesel, árg. 93 til sølu um hóskandi boð fæst. Kann síggjast á www.bil.fo
*Tlf. 213577*

**PEUGEOT 306 TD**
árg. 96, hevur koyrt 109.000 km til sølu.
*Tlf. 443114 eftir kl. 16*

**FORD ESCORT 1.6i**
árg. 95, í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 332643*

**OPEL KADETT 1.3**
árg. 88, við skaða uttan, til sølu til hægstbjóðandi. Hevur plátur og er sýnaður síðsta heyst í oktober.
*Tlf. 312697*

**TOYOTA HIACE**
diesel, árg. 86, til sølu.
*Tlf. 215291*

**SUZUKI BALENO**
frá sept. 1996, myrkabláur við trimum hurðum, koyrt 65.000 km. Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 224202 e. kl. 15*

**BILUR TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, er ein 4 ára gamal Toyota Corolla diesel, koyrt 45.000 km, til sølu.
*Tlf. 315029*

**NISSAN SUNNY**
diesel stationcar, árg. 86, til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 212533*

**FÝRA PÍKADEKK**
á felgum, við skálum, 5 hol, passa til Toyota Carina II, bíliga til sølu.
*Tlf. 254535*

**TIL SØLU**
Nissan Patrol 2.8 TD, árg. 90, hvítur, sýnaður í juli 01, koyrt 225.000 km, sær gott út.
*Tlf. 254535*

**EYKALUTIR**
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95, til sølu.
*Tlf. 227922*

**EYKALUTIR**
til Toyota Carina St. 171 og 88-91: hurðar, bakrútur, spegl, startari, drívaksil og kúfangari framman til sølu.
*Tlf. 227922*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: [1] [2] [3] [4] [5] ferðir
***(set X)*** undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:...
Bústaður:...
Bygd/býur:...
Tlf.: ...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

**FORD FIESTA**
árg. 92 í góðum standi til sølu, nýsýnaður, ongan kross. ring
*tlf. 310659 best eftir kl 17*

**NISSAN SUNNY**
árg. 87, 4 summardekk, 4 píkadekk og 4 sportfelgur v/ dekkum fylgja við. Prísuppskot: 15.000 kr. Fingið fleiri ábøtur. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 318775 ella 257966 e. kl. 18*

**VOLVO 740**
Nýsýnaður Volvo 740 Sedan til sølu, árg. 1986.
*Tlf. 311267 ella 211267*

**TIL SØLU**
Ein Honda Civic, árg. 89, í hampuligum standi, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 216601, e. kl. 16*

**TIL SØLU**
Ein Volvo 340, árg. 87, til sølu sum eykalutir fyri 2.000 kr.
*Tlf. 216601, e. kl. 16*

**FORD ESCORT 1.6 SAVOY**
árg. 88, til sølu sum eykalutur.
*Tlf. 361402 eftir kl. 18*

**TUNINGS BOX**
Power Sys Tunings box til næstan øll bilasløg. Gevur 10-40% ekstra HK, mest til nýggjaru bilarnar. Prísir úr kr. 3.295,-
*Tlf. 319060 ella 264693*

**CITROËN SAXO SPORT 1,6**
til sølu. Bilurin er 15 mðr. og hevur koyrt 44.500 km. Hevur cd & radio, el-rútar, sentrallás, tokulyktir, nakkapútur aftan o.a. Kostar nýggjur 147.000 kr. Verður seldur fyri 100.000 kr. Ringið og fræffið nærri.
*Tlf. 218000*

**HONDA CIVIC 1.5i**
5 hurðar, 114 HK, stórt Pioneer anlegg, 16" sportfelgur, senkaður, svartur, sóltak, spoilarasett, sær sera gott út og í sera góðum standi. Sýnaður 07/01.
*Tlf. 311570, Peter*

**16**
4 hol. 100 mm millum holini. Dekk stødd. 215/45/16. Boð undir 3.000 ongan áhuga!
*Tlf 263430/444707, best eftir kl. 19.00*

**FORD SIERRA 1.6**
Stationcar til sølu. Ford Sierra 1.6 árg. '87, 166.000 km. Prísuppskot: 4.000,-
*Tlf. 321007*

**OPEL KADETT**
1200 S sera bíliga til sølu.
*Tlf. 448196*

**TIL SØLU**
Honda Accord 1.8i, árg. 98, koyrt 57000 km, prísur 130.000. Kann síggjast á bil.fo
*Tlf. 448121*

**NISSAN KINGCAB**
árg. 96, km 70.000, í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 216600*

**LASTBILUR TIL SØLU**
Lastbilur 4 x 2 til sølu. Volvo uml. 20 ára gamal við 3-vegis vippu og krana, 3 t/m. Eykalutir fylgja við. Til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 216600*

**TILBOÐ**
Proton 420 Turbo diesel, nýggjur, 5 hurðar, kr. 129.800,-
*P/F Autoimport, tlf. 218778*

**TIL SØLU**
Eykalutir til BMW 318 TDS árg. 96.
*Tlf. 218778*

**FELGUR TIL SØLU**
Fýra felgur, ongantíð brúktar, passa til Nissan Almera , til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 333574 ella 260074*

**OPEL ASCONA**
Bláur Opel Ascona til sølu sum eykalutur, árg. 87.
*Tlf. 252191*

**VØRUVOGNUR**
Lítil vøruvognur árg. 88 bíliga til sølu.
*Tel. 213046*

**HEVUR NAKAR**
ein kølara til ein Mazda 929 st.car. árg. 88 at selja mær.
*Ring 373169 ella ella 250213*

**OPEL VECTRA**
árg. 12/88, er í góðum standi, men krevur ábøtur. Sýnaður 1.3.2002 til sølu.
*Tlf. 313790 ella 220405*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Volvo 340 DL við fronskum motori.
*Tlf. 424270 - 286504*

## Amboð

**TIL SØLU**
Gravimaskina til sølu – Bobcat 1.5 t. – koyrt uml. 4500 tímar. Í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 216600*

**HITABLÁSARI TIL SØLU**
Kroll hitablásari til verkstað, brennur diesel ella spillolju og ein oljutangi 1200 l.
*Tlf. 217778 ella 218778*

MASTER
- hitaovnar
· Hitakanónir
· Gasovnar
· El-hitaovnar
· Infrareyðir ovnar / sólir
· Avfuktarir
· Hitablásari til turking av grasi - serframleitt til Føroysk viðurskifti
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

## Arbeiði

**REINGERÐARHJÁLP SØKIST**
tveir tímar einaferð um vikuna.
*Tlf. 312257*

**RØSK OG ÁLÍTANDI KVINNA**
– sans fyri pertentligheit og kaos. Dugir at handfara mat – søkist frá 1. apríl til hálvan august til skiftandi arbeiðstíðir. Løn eftir sáttmála.
*Cafe Karlsborg, tlf. 317024*

**ARBEIÐI YNSKIST**
17 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 253321*

**ARBEIÐI YNSKIST**
Tvær gentur 14 og 15 ár søkja arbeiði aftan á skúlatíð í Havn.
*Ring tel. 257879*

## Barnaansing

**ER TAÐ NAKAR**
ið tímir at ansa 11 mðr. gomlu Vár, mánadag-fríggjadag ca. 8 tímar um dagin.
*Tlf. 316706 ella 216990*

**ÁLÍTANDI GENTA/KONA**
søkist at ansa 2 børnum skjótast gjørligt. Ring á
*tlf. 310431 ella 261435 e. kl. 18*

**HEY!**
Manglar tú onkran at passa børnini hjá tær, ert tú vælkomin at ringja til mín – eg eri búsitandi í Lamba.
*Tlf. 260202*

## Barnaútgerð

**BARNAVOGNUR**
Myrkabláur Silver Cross barnavognur við dýnu, kodda og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 456272*

**TIL SØLU**
Myrkareyð babylyft og hvít rimasong bíliga til sølu.
*Tlf. 317637*

**TIL SØLU**
Myrkabláur Brio barnavognur v/ lyft, tasku, fluguneti og regnslagi. Vælhildin. Brúktur til eitt barn.
*Tlf. 310797*

**TIL SØLU**
Tremmusong við madrassu bíliga til sølu.
*Tlf. 447451*

**GRÁUR SCANDIA**
barnakoyristólur til sølu fyri 900,- kr.
*Tlf. 319897, eftir kl. 18*

## Bátaútgerð

**VÁGASNELLUR**
Hálvautomatiskar vágasnellur til sølu.
*Tlf. 223011*

**YNSKIST**
Er nakar, ið ynskir at fáa bátin ansaðan, vil eg fegin taka mær av tí.
*Tlf. 318117*

**YNSKIST**
Bátur 6-8 mannafar ynskist til keyps. Millum kr. 10.000-20.000,-
*Tlf. 318117*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Bátur 26-30 fót við fiskiloyvi ynskist til keyps.
*Tlf. 447769*

## Bingo

**GOTT BINGO**
verður í Starvsmannafelagshúsinum, J. H. Schrøtersgøta 9, mánakvøldið 18. mars. kl. 19.00. Full pláta 400 kr. Nógvir góðir vinningar. M.a. á lutaseðli 2x1.000 kr., 2x500 kr. Tvey førysk páskaegg. 15 plátur fyri 100 kr. Drigið verður um páskaegg millum spølini. Eykaspæl aftaná. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Spastikarafelagið*

**SUÐUROYINGAR**
Bingo verður í Gistingarhúsinum í Øravík 2. páskadag, 1. apríl, kl. 17.
*Bygdarhúsfelagið í Hovi*

**AB-STUÐLAR SKIPA FYRI**
rimmar páskabingo í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 21.3. kl. 19.00. Páskaegg, páskamatur og nógv annað verður at vinna. Á lutaseðli tvær baljur fullar av mati. Páskaegg sum millumspæl. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*AB-stuðlar*

**TVØROYRAR KLUBBI**
hevur bingo leygarkvøldið 16. mars kl. 20.00.
*Nevndin*

**GOTT PÁSKABINGO**
verður í Tórshøll leygardagin 16. mars kl. 20.00. Øll eru vælkomin.
*Tórshøll*

**FRÁ EYDNUNI**
Gott páskabingo verður sunnudagin 17.3. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Eykaspælið 800 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1500 kr. Drigið verður millum spølini.
*Eydnan*

**KØKUTOMBOLA Í SMS**
Amnesty International hevur køkutombola á torginum í SMS leygardagin 16. mars. Tiltakið byrjar kl. 10.00 og er opið til handlarnir steingja.
*Amnesty International*

## Burturm. /funnið

**ADIDAS-HÚGVA**
Rani hevur mist sína húgvu uttanfyri SMS hósdagin 7.3. Hevði tlf. nr. eisini staðið á, høvdu tit húgvuna aftur sama dag – altso ikki bara navn, men eisini tlf. nr. í klæðunum.
*Tlf. 314213 eftir kl. 16.30*

**NOKIA-TELEFON BURTURMIST**
Hevur nakar sæð mína Nokia-telefon? Eg misti hana vekk sunnudagin í Klaksvík, møguliga á Fimleikaframsýningini. Telefonin er grøn og reyð og glitrar. Um onkur hevur funnið hana, ring so á 457023, ella legg hana inn á Sosialin í Klaksvík
*Tlf. 457023*

## Býli

**ÍBÚÐ YNSKIST!!!**
Ungt par við einum barni (4 ár) søkir hús/íbúð til leigu í Havn. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina. Má hava 2 kømur og max 5.000 kr. um mánaðin við øllum – alt hevur áhuga. Um nakar kann hjálpa okkum, vinarliga ring
*tlf. 252783*

**HÚS Í LEIRVÍK TIL SØLU**
Húsini eru 155 kvm – eittplanshús. Køkur, stova, durur, gongd, baðiverilsi, millumrúm, og 5 kømur. Prísur 650.000 ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 224984*

**SETHÚS Í VÁGI**
til sølu. Húsini eru bygd í 1988 og nýupppussaði innan í 2001. Húsini standa uppi í Gjógvarábø. Áhugaði kunnu ringja
*tlf. 373675 ella 263035*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Einlig mamma søkir íbúð við 2 kømurum í Havn. Má ikki kosta meira enn 4.000,- kr. um mðr.
*Tlf. 255913*

**TIL LEIGU Í DK**
Raðhús, 180 fermetrar, nær Keypmannahavn (Nivå) til leigu frá 1/8. Liggja 2 min. frá Kystbanatokstatiónini, nær innkeypssentur, barnaskúla, dagstovnar, sandstrond og skóg. Sera barnavinarligt umhvørvi við fleiri spæliplássum.
*Tlf. 311430*

**ÍBÚÐIN ER ÚTLEIGAÐ**
Íbúðin á 50 fermetrar við bill. mrk. 1292-1 er útleigað. Takk fyri áhugan. Vinarliga
*bill. mrk. 1292-1*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Trúgvandi familja ynskir íbúð í Havn skjótast tilber.
*Tlf. 313259*

**SUMMARFRÍ Í ÅRHUS**
Modernað íbúð í Århus City (Frederiksgade) til leigu frá 13. juli til 27. juli. 5 soviplass. Kostnaður 3.000 kr. pr. viku.
*Tlf. 0045-86130448, e. kl. 17*

**KAMAR TIL LEIGU**
á Eysturbrúgv í Keypmannahavn frá 1. apríl. fyri 2.800 kr.
*Tlf. 39291834*

**KAMAR TIL LEIGU**
v/ atgongd til køk, baðirúm, vaskirúm og felagsrúm. Til fólk, ið ikki roykir.
*Tlf. 317425, e. kl. 18*

**HÚS YNSKJAST**
Ein familja v/ 3 børnum ynskir hús skjótast gjørligt. Prísuppskot: 7.000 mðr.
*Tlf. 264513*